


*Í fyrstu atløgu umfatar Eiði 2 strekkið frá Norðskála norður til Svínáir*

# Eiði 2 minkar um CO2

**Skjøtil er settur á 2. byggistig av Eiði 2 ætlanini. Tá øll ætlanin er liðugt fer hetta at merkja eina oljusparing fyri SEV upp á 3.600 tons árliga**

VATNORKA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

SEV arbeiðir støðugt við at útbyggja vatnorkuna á Eiði. Nú er felagið farið í holt við 2. byggistig av Eiði 2 ætlanini, sum umfatar ein sonevndan samlitunnil, sum skal flyta vatn úr dalinum omanfyri Norðskála norður í Eiðisvatn.

Talan er í fyrsta umfari um ein góðan tveir kilometra langan tunnil frá Norðskála norður í íbindingina við Svínáir.

- Hetta er tað, vit hava fingið loyvi til frá Yvirfriðingarnevndini. Restin av Eiði 2 ætlanini er til viðgerðar hjá friðingarmyndugleikunum í løtuni, sigur Hákun Djurhuus, nýggi stjórin í SEV.

Restin av Eiði 2 ætlanini røkkur um ein samlitunnil suður móti Selatrað, sum verður 11 kilometrar langur.

Friðingarmyndugleikarnir eru í løtuni í holt við at gera árinskanningar og støðulýsingar av økinum, og leiðslan í SEV roknar við, at eitt úrslit fyriliggur einaferð seinni í vár.

Hákun Djurhuus boðaði frá beinanvegin sum tað varð greitt, at hann gjørdist nýggi stjórin í elfelagnum, at hann fór at leggja stóran dent á umhvørvið. Og í so máta er Eiði 2 ætlanin eitt risastig á røttu leiðini.

- Hetta byggistigið fer at økja um vatnorkuframleiðsluna við fýra milliónum kilowatt tímum um árið, og tá øll Eiði 2 ætlanin er liðug, verður orkan økt við tilsamans 17 milliónum kilowatt tímum, sigur Hákun Djurhuus.

## Spara CO2 útlát

Økta framleiðslan í vatnorku merkir samstundis, at SEV sparir 3.600 tons av olju, og tað merkir við verandi oljuprísum eina sparing upp á áleið 10 milliónir krónur um árið.

Men eisini á umhvørvisliga økinum merkir hetta nakað fyri Føroyar, tí minni forbrenning av olju merkir eisini minni CO2 útlát. Tá samlaða oljunýtslan fyri Føroyar er áleið 230.000 tons um árið, merkir 3.600 tons eina sparing upp á 1,6%, og harvið verður CO2 útlátið eisini minkað við somu 1,6%.

Hetta verður so sparingin, tá øll Eiði 2 ætlanin er førd út í lívið. Og sum nevnt er størri parturin eftir, tá hetta byggistigið er framt.

Hesin tunnilin verður gjørdur eftir vanligum leisti við at spreingja og grava. Seinni, tá eftirverandi 11 kilometrarnir verða boraðir, verður hetta gjørt við serliga borivogninum hjá SEV, sum nýttur var til fyrsta byggistig av Eiði 2 ætlanini.

Upprunaliga kostnaðarmetingin segði, at samlaði kostnaðurin fór at liggja um 150 millónir, men tað var fyri fimm árum síðani. Nú verður mett, at prísurin fer at liggja nærri teimum 200 milliónunum.

Arbeiðið, sum J & K Petersen gera saman við MT Højgaard, fer væntandi at liggja um 60 milliónir krónur við øllum.



*John Danielsen, fíggjarleiðari, og Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, tosa um Eiði 2 ætlanina*
*Mynd: Jens Kristian Vang*